gult cyan magenta svart



# Todi hevur vunnið sær lykláplass

*Føroyska álopsessið hevði týðandi leiklut í vinstru síðu, tá FCK og Celtic spældu 2–2 í Parkini*



*Todi Jónsson tykist trívast væl á miðvallarplássinum í 4-4-2 skipanini hjá Roy Hodgson*

FCK hevur fingið nýggjan venjara. Tá nýggjur venjari kemur í eitt felag, er tað altíð spennandi at síggja, hvat hann heldur um teir einstøku spælararnar. Roy Hodgson er ikki hvør sum helst. Bretin hevur m.a. verið venjari í Svøríki, Italia og Sveis, og hann hevur verið við til at vunnið nógv.

Nú er hann í FCK, og um vit skulu meta út frá fyrireikingunum til nýggja kappingarárið, sum tað verður farið undir í hesi vikuni, so heldur nýggi venjarin nógv av Toda Jónsson.

Todi hevur verið við ímillum teir fyrstu ellivu í øllum venjingardystunum. Hodgeson nýtir 4–4–2 leikháttin, og hann hevur fyri tað mesta brúkt Toda Jónsson á ytsta miðvallarplássinum í vinstru.

Todi hevur skorað fleiri mál í venjingardystum móti veikari liðum. Síðsta kappingarár var stóri leikluturin hjá fremsta málskjúttanum á føroyska landsliðnum at leggja upp til teir fremstu, og tá FCK í síðstu viku í Parkini spældi ímóti skotska stórfelagnum Celtic, var tað aftur leikluturin hjá Toda at leggja upp.

Millum teir 6066 áskoðararnar vóru fleiri føroyingar. Teir sóu Toda spæla teir fyrstu 67 minuttirnar. So varð hann avloystur av Thomas Thorninger. Tá var støðan 2–1 til FCK. Úrslitið gjørdist 2–2.

Celtic javnaði til 2–2, tá tað restaðu níggju minuttir. Mark Burchill skoraði bæði málini hjá skotunum. Teir hava í summarsteðginum keypt Chris Sutton frá Chelsea. Fyrrverandi málslúkurin í Blackburn, sum eisini hevur verið á eingilska landsliðnum, gjørdi púrt einki um seg í London. Nú fara hann og annað stórfelagið í Glasgow at royna samstarv. Men Chris Sutton var ikki við í Parkini.

### Leikluturin hjá Toda

Tá eitt korter var farið hóskvøldið skoraði norski álopsmaðurin hjá FCK Harald Brattbakk til 1–0. Fimm minuttir seinni fekk FCK aftur mál, men dómarin kolldømdi málið, tí hann helt, at Todi Jónsson hevði verið í so harðligur móti málverjanum hjá Celtic.

Í 38. minutti økti norski álopsmaðurin til 2–0. Hesa ferðina átti Todi Jónsson alt uppleggið sum tað var. Hann sneiddi fleiri av og rann frá øllum í vinstru, og so smekkaði hann flatt innfyri. Harald Brattbakk var fyrstur á og takklaði innleggið í kassan.

Tveir minuttir seinni hevði Todi góða skotroynd av brotsteigarmarkinum. Suðurafrikanarin Zuma, sm í fjør fyri tað mesta var í álopinum, var hesa ferð ytstur á miðvøllinum í høgru. Hann legði væl innfyri, Todi smekkaði til, men málverjin kom væl niður og bjargaði.

Tríggjar minuttir eftir steðgin var um reppið, at Harald Brattbakk gjørdi hattrikk. Todi Jónsson lyfti hegnisliga framum verjuna, álopsmaðurin gjørdist púra leysur, men tá hann setti framvið málverjanum, sum kom út ímóti, fór bólturin við síðuna av málinum.

Fyrsrti dysturin hjá FCK í nýggja kappingarárinum verður sunnudagin í Parkini. Tá fáa teir vitjan av nýggja felagnum í superliguni Haderslev. Talan verður um fyrstu royndina nakrantíð hjá suðurjútska liðnum í bestu deildini. FSC má finna seg í, at teir verða roknaðir sum stórfavorittar. Tey seinnu árini hevur tað verri enn so altíð gingið, sum teir í FCK hava vónað, og sum onnur hava roknað við. Sunnudagin fæst fyrsta ábendingin um, um Roy Hodgson hevur megnað at sett viljan at vinna í allar spælararnar. jh

# Sogndal saknaði Kurt

*Føroyska liðið tapti móti næstniðasta liðnum, sum hevur fingið nýggjan íblástur*

Føroyska liðið í norskum fótbólti fekk eina syndarliga byrjan, tá teir sunnudagin aftur fóru í eldin eftir at hava hildið frí í tvær vikur. Sogndal spældi á útivølli móti Hønefoss, sum er næstniðast á støðutalvuni. Hønefoss vann 2–0, og sunnukvøldið rannsakaðu teir í Sogndal seg sjálvar og spurdu, hvussu hetta kundi bera til.

En av niðurstøðunum var, at álopið er alt ov pappírskent, tá Kurt Mørkøre ikki er á liðnum. Kurt Mørkøre hevur ikki fingið so ógvuliga nógv gul kort, síðani hann fór til Noregs at spæla. Men nú hevði hann savnað sær so mikið á kontoina, at hann ikki slapp at spæla við, og tað merktist væl á framrættaða avrikinum:

– Vit vóru alt ov tunnir í álopspartinum. Vit høvdu so at siga ongar royndir móti málinum, og so ber ikki til at vinna. Um vit høvdu havt Kurt Mørkøre í álopinum, so høvdu vit ivaleyst havt skorað eitt mál, og so hevði tað beinanvegin sæð heilt øðrvísi út. Kurt er sera populerur í Sogndal. Teir halda, at hann er eitt tað besta keypið, sum teir nakrantíð hava gjørt.

Tað er Hans Fróði Hansen, sum er í hinum endanum. Hann var í miðverjuni allar 90 minuttirnar, og Julian Johnsson stríddist á miðvøllinum. Í VG fær Hans Fróði eitt trý tal fyri sítt avrik, og Julian fær eitt fimm tal fyri sítt avrik. Men sambært Hans Fróða, so var einasti glottin, sum illa nøgdi venjarin dugdi at síggja, verjuspælið:

– Hóast hinir skoraðu eftir eitt korter og aftur eftir 77 minuttir, so segði venjarin seg vera frægast nøgdan við tað, sum vit í verjuni gjørdu. Eg haldi, at Julian arbeiddi nógv, men tað er sera torført at vera miðvallarspælari, tá tað verður sparkað so nógv og spælt so lítið. Vit hava gingið at vita, at bólturin skal fram beinanvegin, og tað er sera sjáldan, at eg spæli bóltin og ikki sparki hann. Tað er ikki serliga hugaligt.

Hans Fróði heldur, at avrikið sm heild var ússaligt, og hann velur at halda, at talan var um ein kollektivan off day, sum hann tekur til.

### Strevið

Bæði í fyrradagin og í gjár var av besta veðrið í Noregi. Sólin skein oman og niðan, og tað var heitt í veðrinum. Í gjár vandu teir í Sogndal bæði fyrrapartin og seinnapartin.

– Vit koyra í bussi til allar útidystirnar. Teinarnir eru langir, og tað er ikki serliga motiverandi at sita í nogvum hita at sita í einum bussi í nógvar tímar, áðrenn tú skal spæla. Sum dømi um hetta kann ev nevna, at sunnudagin spældu vit klokkan seks á útivølli. Vit ferðaðust í bussi í seks tímar, og vit komu ikki til satdion fyrrenn trý korter, áðrenn vit skuldu spæla. Tað eru ikki optimalar umstøður at fyrireika seg undir, heldur Hans Fróði Hansen. Tað vil við øðrum orðum siga, at hann og Julian Johnsson og hinir í Sogndal sótu í tólv tímar í bussi sunnudagin – og teir taptu 2–0.

Tað horyir við til søguna, at Hønefoss hevur skift venjara í summar. Lars Tjørnås, sum er kendur í felagnum, hevur fingið ábyrgdina. Hann er komin aftur úr Wimbledon, har hann var hjálparvenjari hjá Egil Olsen, fyrrverandi landsliðsvenjaranum, sum fekk sekkin fyrr í summar.

Í norskum fjølmiðlum verður sagt, at Hønefoss var sera ágangandi, og at teir tóktust hava fingið nakað av sjálvsálitinum aftur.

Sogndal er á fimta plássi í næstbestu deildini. Teir hava 23 stig. Hønefoss er næstaftast við 12 stigum. Flestu liðini hava spælt fjúrtan dystir, men Sogndal hevur spælt trettan dystir.

– Nú skulu vit spæla tvær ferðir á heimavølli. Tað er hugaligari, enn at ferðast langt til útidystirnar. Komandi sunnudag verður tað strevið, sjálvt um vit skulu spæla á heimavølli. Tá fá vit vitjan av Lyn. Teir eru oddalið. Í Sogndal verður framvegis tosað um uppflyting, og vit hava framvegis møguleikan. Um hann skal gerast veruleiki, so er tað neyðugt, at vit vinna sunnudagin, staðfestir Hans Fróði Hansen, sum kennir seg inni afture í hitanum, eftir at hann undan stutta summarsteðginum var á beinkinum og onkuntíð spældi á næstbesta liðnum.

Sunnudagin verður Kurt Mørkøre í álopinum hjá Sogndal, og so fæst at síggja, um toppskjúttin í næstbestu norsku deildini aftur fer at gera um seg.

JH

# Kappróður

*Vestmenningur vann á heimasjógvi, og fleiri føroyameistarar vórðu kosnir á vestanstevnu. Stór frásøgn frá kappróðrinum er í blaðnum í morgin*





## Viðmerking

# Hatta var ikki ein takkling for h…

**Tá ið tað frættist úr Geneve, at Jugoslaviski fótbóltsrisin, Reyða Stjørna, fór at koma til Føroyar at leika Champions League dyst móti greipuvinnarunum úr Klaksvík, fór so smátt ein afturvendandi longsul at spæla sær í eini glataðari fótbóltssál.**



### Einaferð var tað…

Partar av oyggjunum eru so smátt aftur farnir at merkja vatntrotið, men vit kunnu við stórum bókstavum siga, at nógv vatn er runnið í ánna í føroyska fótbóltsheiminum, síðani tvøroyrarmenn stovnaðu Tvøroyrar Bóltfelag fyri meira enn hundrað árum síðani.

Einaferð vóru tað grúsvallir, so kom graslíkið og til síðst náttúrugivna grasið. Besta spæliplássið, eg sum smádrongur visti um. Á grasfløtunum nógvu hermdu vit eftir fótbóltsstjørnunum. Í hugaheiminum fyrigykladu vit okkum, hvussu Cruyff, Beckenbauer, Pele og aðrir gjørdu, tí fáar ella ongar rullandi myndir vóru at herma eftir. Onkur hissini brot av onkrum smalfilmi høvdu fest røtur. Heldur var tað lurtitóli við frásagnunum úr Englandi og danska ítróttarblaðið, ”Alt om Sport”. Føroyskir fótbóltsleikarar riggaðu eisini framúr væl sum stjørnur í barnasinni okkara. TB leikarar stóðu fremstir. Nakrar eru ferðirnar av Sandi við báti til Tvøroyar at hyggja eftir dysti, serliga teir millum TB og HB. Hendrik Thomsen var so avgjørt ein av stjørnunum. Málverjin Gordon Hofgaard ein onnur. Flott mynd av meksikanska landsliðsmálverjanum var einferð at síggja í Alt om Sport. Í leysum lofti, í fullari longd heilt uppi í málhorninum, væl tikið!! Gamaní, hetta var ivaleyst ein góð bjarging, men eg og hin smádrongurin ivaðust onga løtu í, at Gordon sum onki hevði megnað at tikið sama skot. Hví í allari víðu verð skuldi ein málverji úr Meksiko vera betri enn Gordon Hofgaard? Á Sevmýru var stemningur og rómur. Gloymdur var tann øgiligi sjóverkurin. Nógv mátti leggjast fyri, skuldi smádrongurin fáa møguleikan at uppliva fótbóltsstjørnurnar á vølli. Uppliva ævintýrið. Einaferð var tað..

### Fótbólturin í sjónvarpinum

Sjónvarpið kom, og nú kunnu vit, eisini børnini, nærum dagliga við okkara egnu eygum síggja útlendsku stjørnurnar. Nú vita vit við vissu, at teir á skíggjanum nærum altíð eru betri enn vit. Fótbóltsfóðringin á húsaaltarinum hevur eisini sínar keðiligu fylgisneytar, tíverri. Haldi, at tann fótbóltsáhugaði alt ov ofta er fallin í ta sera djúpu illa gongdu grøv, at samanbera tað sædda á skíggjanum við okkara heimaliga fótbóltsspæl. Hesin samanburður førir við sær eina ónøgd, ið aftur ger, at føroyski áskoðarin ofta kemur at uppliva keðiligan fótbólt her hjá okkum. Órættvíst og skeivt er tað, bæði fyri áskoðaran sjálvan, men eisini og ikki minst fyri leikararnar.

### FK Crvena Zvezda eitt ”must”

Smádrongurin er vaksin, men ævintýrið er eins spennandi og dragandi. Havnarmenninir hildu tó, at sandingarnir vóru ikki sørt tápuligur at fara heilt inn á Toftir at síggja fótbóltsdyst. Júmen, eru tit ikki greiðir yvir, hvør spælir á Toftum? Jú, KÍ, bleiv skemtandi svarað aftur. Og eg sum helt, at Crvena Zvezda var eitt avgjørt ”must” hjá øllum fótbóltsáhugaðum. Havnarmenninir tímdu ikki, ómaksleyst sum tað er hjá teimum at koma aftur og fram. Vit fóru longu leiðini, hóast vit ikki fingu bilin við til Havnar. Gjørdu kortini av at fara. Møguleiki var helst fyri at læna bil í Havnini. Suður aftur máttu vit í opnum báti, tí eingin Tróndur siglur so seint á kvøldi. So kanska var tað ikki løgið, at havnarmenninir hildu, at sandingarnir vóru ”fótbóltsidiotar”. Umborð á Tróndi vóru vit so hepnir at hitta sparikassamann, ið fegin vildi koyra okkum. Dagurin bjargaður fyri okkara viðkomandi!!

### Bíðaðu til fánýtis, tíbetur

Reyði bilurin náddi Svangaskarð beint áðrenn dystarbyrjan, og vit skundaðu okkum at finna nøkur tóm blá setur. Friður valdaði sum um áskoðararnir bert sótu og bíðaðu eftir øllum teimum mongu jugoslavisku málunum, ið koma skuldu. Vit bíðaðu í tolni, men tey komu ikki. Nakað serliga nærgangandi vóru Reyðu Stjørnurnar heldur ikki. Ein skallari á yvirleggjaran eftir innlegg úr vinstru var tað nærmasta jugoslavarnir komu fyrra part av fyrra hálvleiki. Hetta gongur bara væl, vóru vit einigir um. Onkrir áskoðarar ótolnaðust. Vildu hava KÍ liðið at fara longur fram á vøllin, men tað hildu vit í ferðalagnum ikki, tí so_ Rætt høvdu vit. Tí, áskoðarin beint aftanfyri meg hevði ikki meira enn staðfest, at hetta sá ikki so galið út, tó at hann var bangin fyri øðrum hálvleiki, so var galið. KÍ liðið hevur flutt seg langt fram á vøllin í tveimum førum, og so gongur skjótt móti KÍ málinum. Eini møguleikin gevur jugoslavunum mál, hin førir brotsspark við sær. Best mundi verða hjá KÍ´arunum at halda seg afturi í egnum máli!!!

KÍ leikararnir stríddust manniliga allan dystin, men vit vóru samdir um, at Jan Joensen hevði spælt ein sera góðan dyst. Stríddist manniliga, tordi og dugdi væl at halda upp á bóltin, spældi hann skilagott frá sær, gott avrik!! Í fyrra hálvleiki fekk hann gult kort fyri glíðandi takkling. KÍ áskoðarin beint niðanfyri okkum var tó ikki í iva um, at avgerð dómarans var skeiv. ”Hatta var ikki ein takkling for h__”

Áskoðararnir róptu annars ikki nógv fyri ikki at siga onki. Steindeytt fyri tað mesta. Mitt í fyrra hálvleiki royndi tó ein á hinari síðuni at heppa: KÍííííí Kííííí drynjaði tað útyvir leikvøllin. Kanska var hetta ein havnamaður, ið spældi hund, tí tað ljóðaði júst sum HB ljóðið: HÅÅÅÅÅ-BBBBBBB

Fyrri hálvleikur var av, og vit gjørdu klárt til annan. Maðurin í reyðu ketildraktini á niðasta bonki var og fekk sær ein kaffimunn í hálvleikinum. Sá út til at vera í góðum hýri. Í hvussu so er var ikki nógv eftir í kaffikoppinum, tá ið hann var komin aftur at sita, men vegurin niðan aftur eftir meira var langur, so harvið mátti tað verða.

Í seinna hálvleiki komu tvey mál afturat. Myrku skýggini yvir Havnini nærkaðust, men regnið kom ikki. Talan bleiv heldur ikki um nakað jugoslaviskt óveður. Var eitt sindur skuffaður av teimum. Teir høvdu bóltin nógv, men einki fantastiskt var yvir teimum. Eingin leikari, ið tú sum so legði merki til. KÍ avrikið var gott. Teir gjørdu tað, teir kundu. Eri rættiliga vísur í, at fóru teir 10 metrar longur fram á vøllin, so høvdu teir ikki tapt 3-0 heldur tað dupulta. Teir ómetaliga friðaligu áskoðararnir reistust fimm minuttir, áðrenn liðugt var.

### Reyða Stjørna hevur vitjað

Who cares, sum tey ungu plaga at málbera seg. Dagurin í dag bjóðar okkurt nýtt, tað ger dagurin í morgin eisini o.s.fr. Altíð hendir okkurt soleiðis at vit ikki *mugu* keða okkum. Men hvussu ber tað til, at sokallaðu ”fótbóltsidiotarnir” leggja so nógv fyri fyri at uppliva fyri teir ævintýrkent spæl? Hvørjar eru frágreiðingarnar? Tær eru nógvar! Kendi eingilski fótbóltsrithøvundurin Nick Hornby hevur hesa frágreiðingina í bók síni Fever Pitch. Forsøgan er fantastiski sigurin hjá Arsenal móti Liverpool á Anfield Road í 1989. Arsenal skorar til 2-0 í síðsta minutti og vinnur harvið enska meistaraheitið 1989.

”What is the correct analogy for a moment like that? In Pete Davies´s brilliant book about the 1990 World Cup, *All Played Out*, he notices that the players use sexual imagery when trying to explain what it feels like to score a goal. I can see that sometimes, for some of the more workaday transcendent moments. Smith´s third goal in our 3-0 win against Liverpool in December 1990, for example, four days after we´d been beaten 6-2 at home by Manchester United — that felt pretty good, a perfect release to an hour of mounting excitement. And four or five years back, at Norwich, Arsenal scored four times in sexteen minutes after trailing for most of the game, a quarter of an hour which also had a kind of sexual otherworldliness to it.

The trouble with the orgasm as metaphor here is that the orgasm, though obviously pleasurable, is familiar, repeatable(within a couple of hours if you´ve been eating your greens), and predictable, particularly for a man — if you´re having sex then you know what´s coming, as it were. Maybe if I hadn´t made love for eighteen years, and had given up hope of doing so for another eighteen, and then suddenly, out of the blue, an opportunity presented itself_ maybe in these circumstances it would be possible to recreate an approximation of that Anfield moment. Even though there is no question that sex is a nicer activity than watching football (no nil-nil draws, no offside trap, no cup upsets, *and* you´re warm), in the normal run of things, the felelings it engenders are simply not as intense as those brought about by a once-in-a-lifetime last-minute Championship winner”

Provokerandi og áhugaverd orð frá eingilskmanninum. Hvat siga vinmenninir hjá mær í ferðalagnum inn á Toftir? Dysturin í gjár rakk ikki hæddirnar!!! Men vit sóu ein evropeiskan fótbóltsrisa!

KÍ verður ynskt góða eydnu í Beograd!!

**Eli Hentze**

gult cyan magenta svart